Landsfelag Pensjónista

Tórshavn 15. nov. 2023

Til Løgtingsins Fíggjarnevnd

t-post: hallurm@logting.fo

Viðmerkingar til

Uppskot til løgtingslógir um broytingar í 5 løgtingslógum LM-036-40/2023

Viðmerkingarnar eru í høvuðsheitum til LM-036/2023 um áseting av skatti.

Ætlaði skattalættin er sosialt skeivur, og gjógvin millum rík og fátæk gerst størri, tí hesi uppskotini geva teimum fátæku «molarnar», meðan tey ríku koma til «vældekkað borð».

Okkara limir sum fáa fólkapensjón, fáa ein skattalætta uppá ávikavist 499 kr. og 724 kr. um árið, ið er millum 42 kr. og 60 kr. um mánaðan, meðan t.d. tingfólk og onnur við hægri lønum, fáa 5.900 kr. um árið, ið er 492 kr. um mánaðan.

Inntøka við fólkapensjón og Samhaldsfasta um mánaðan í 2024 aftaná lógarkrøvd avgjøld og "skattalætta", har ongin onnur inntøka er enn fólkapensjón:

	Stakur fólkapensjónistur	Giftur fólkapensjónistur
Gomul skipan	13.403 kr./md	11.632 kr./md
Nýggj skipan	13.421 kr./md	11.643 kr./md

Ætlaði skattalættin skal m.a. fíggjast við at hækka brennioljugjaldið við 20 oyrum pr. litur, og sum viðførir, at t.d. pensjónistar skulu gjalda meira fyri oljuna, og hetta meirgjaldið fer avstað við meginpartin av tí, sum skattalættin gevur. Hjá pensjónistum er sostatt talan um ein skattalætta, sum bert er ein «viðfáningur» og hjá sjófólki okkara, sum í forvegin hava lágar inntøkur, serliga teir sum fiska við Føroyar, er møguliga talan um tað øvugta av skattalætta. Sama verður galdandi fyri tey sum arbeiða í øðrum londum.

Tvs. uppskotini um skattalættar til tey við hægri lønum, skal fíggjast við at taka frá sjófólki okkara, og øðrum sum arbeiða uttanlanda og sum hava tað til felags, at tey eru burtur frá heimi og familjuni, meginpartin av árinum, tað er sosialt órættvíst.

So fyri okkara limir, sum eru fólkapensjónistar, er hetta ikki nakað sum kollveltir tilveruna, tí við aðrari hondini fáa vit 500-750 kr. og við hinari hondini verður kravt uml. 500 kr. í øktum brennioljugjaldi.

Landsfelag Pensjónista

Ein útreiðsla, ið verður løgd afturat hjá pensjónistum, er ein stór hækking hjá Heilsutrygd, har tilskotsstigin verður hækkaður, soleiðis at egingjaldið verður hækkað við 53%, ið er 800 kr. um árið (tað er meira enn skattalættin).

Uppskot til broytingar:
Soleiðis sum ætlaði skattalættin er settur saman, so eru tað tey við teimum hægru inntøkunum, ið fáa mest burturúr skattalættanum.
Fyri at pensjónistar og onnur við lágari inntøku eisini kunnu fáa eitt sindur av skattalættanum, kundi skattalógin verið broytt soleiðis, at inntøkan uppá 65.000 kr., ið ikki verður skattað í landsskatti, verður broytt til t.d. 90.000 kr.
Tað hevði givið ein skattalætta uppá 3.750 kr. um árið, og hetta hevði verið meira rættvíst.

Beate L. Samuelsen, forkvinna
Landsfelag Pensjónista